# Norskt so tað baskar

**Tað bæði smakkaði, luktaði og ljóðaði norskt í miðbýnum í Havn fríggjamorgunin**

NORSKT
*Heri á Rógvi*
*Heri@sosialurin.fo*




*Útvarpsverturin Birger Meland ger samrøðu við Kára Reynheim og Dia Midjord. Teir hava báðir verið venjarar í Norra, og tað bilaði heldur ikki hjá teimum at tosa norskt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Spæl so Teitur.

Norski útvarpsverturin Birger Meland frá NRK hevur eitt sindur ilt við at fáa síni fólk í Norra at skilja, hvør víðagitni føroyski sangarin er – og hvussu navnið skal úttalast. Ein tøkningur frá Ùtvarpi Føroya kemur honum til hjálpar, og tað vísir, at tað ikki allíkavæl er Teitur norsku lurtararnir skulu leggja oyra til.

So er klárt at senda. Klokkan 10.03 verður latið beinleiðis upp fyri radiobylgjunum millum NRK Sogn og Fjordane og miðbýin í Havn. Staðið, sum nógv velja at kalla Sparikassagarðurin, er karmur fyri norsku herligheitini hendan fríggjamorgunin.

Umframt útvarpsvertin Birger Meland, sum flest øll norsk fjølmiðlafólk er ein tilkomin gráhærdur maður, hava borgararnir í høvuðsstaðnum og fólk á leiðini eisini møguleikan at smakka eitt sindur av góðum gomlum norskum mati. Matur, sum teir sjálvir rópa víkingamat.

– Hann heldur sær allanvegin til Onglands, sigur ein av norsku kokkunum, meðan hann trýstir eitt sindur av Mylsa niður í undirritaða.

Tað verður meira enn bert trupult at greiða ítøkiliga frá øllum rættunum, so tit mugu noyðast við, at upplivingin hjá undirritaða var, at maturin smakkaði bara væl. Og jú, maturin kundi minna eitt sindur um føroyskan mat. Har var svínakjøt, mår pølse, geit spekekjøtt, gammel ost og mangt annað.

Vitjanin hjá norsku útvarpsfólkunum er samskipað við einari upplýsandi herferð hjá Fjord1 og einum samtaki av norsku matframleiðarunum, sum framleiða tann góða gamla matin.

Birger Meland og hansara fólk koma frá einari NRK deild, ið rópast fyri NRK Sogn og Fjordane, sum hevur lurtararnir í norðurvestur Norra. Umframt at framleiða seks tímar av útvarpi um dagin, so verður eisini framleitt sjónvarpstilfar til eina lokala tíðindasending hjá NRK. Birger Meland stendur á odda fyri einari morgunsending, sum sigst at hava einar 50.000 lurtarar.

Men Teitur og hin sangarin, sum norski verturin heldur eitur Eivør ella okkurt líknandi, eru ikki tað einasta, sum NRK spælir av føroyskum tónleiki hendan dagin. Ùtvarpsstøðin hevur eisini ligið framvið og tikið upp Hanus G. Johansen, tá hann hevur skrivað tónleik til yrking hjá ídna norsku yrkjaranum Jakob Sande.

Nú klokkan spakuliga gerst hálvgum ellivu byrjar áhugin hjá fólki at økjast munandi. Norski útvarpsverturin hevur eisini fingið fatur á fleiri fólkum, sum hava havt tilknýti til Sogn og Fjordane. Teirra millum eru Jenny Petersen, sum nú starvast innan yrkissjónleik í Føroyum, men hevur hevur búð í Norra í fjúrtan ár. Eisini Kári Reynheim og Dia Midjord vóru gestir hjá norska útvarpsvertinum. Teir hava báðir verið virknir innan ítrótt í økinum, har sendararnir hjá NRK Sogn og Fjordane røkka.

Og tað byrjaði so smátt at gerast norskt í Havn. Tað bæði ljóðaði, luktaði og kendist norskt hesa løtuna í miðbýnum í Havn.



*Klaksvíkingurin Jógvan Andrias Joensen, t.v., er til dagligt mentanarstjóri í norska býnum Fjaler. Her roynir hann eitt sindur av geitakjøti*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Tað smakkaði hjá hesum kvinnunum fríggjamorgunin, tá tær fingu sær av tí góða gamla norska matinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nógvur roykur – men eingin grind

**Ein støveksplotíón var orsøkin til, at sløkkiliðið varð boðsent á Havsbrún í Fuglafirði**

EKSPLOTIÒN
*Heri á Rógvi*
*Heri@sosialurin.fo*

À einari av silounum, sum verða nýttar til at goyma fiskamjøl, stóð ein maður. Klokkan 18.49 fekk hann ein skelk, ið hann óivað fer at minnast í langa tíð. Brádliga hoyrdi hann eitt øgiligt óljóð undir sær, og hann gjørdist umgyrdur av royki. Sløkkiliðið var boðsent og kom skjótt á staðið, men lukkutíð kundi tað staðfestast, at neyðugt var ikki at sløkkja nakran eld.

– Tað hendi ein støveksplotiónin, sum er eksplotión av tí støvi og tí luft, sum er í Siloini. Hetta er eitt vælkent fyribrigdi, ið er trupult at verja seg fullkomiliga ímóti, sigur Ingvi Lava Olsen, tekniskur stjóri á Havsbrún.

Tekniski stjórin fegnast um, at maðurin, sum varð staddur á Siloini ikki fekk nakran skaða. Ingvi rósar eisini sløkkiðliðnum fyri at koma skjótt á staðið. Siloin var ein triðingsfull, tá eksplotiónin hendi.

– Siloin fekk eitt sindur av skaða, men tað er ikki nakað, sum fær nakran størri fíggjarligan týdning ella ávirkar framleiðsluna nakað munandi, sigur Ingvi.



*Ein støveskplotión í einari av Silounum hjá Havsbrún gjørdi tað neyðugt at boðsenda sløkkiliðnum, men lukkutíð var ikki neyðugt at sløkkja nakran eld*



# FIFA heiðrar Haldgrím

**– Eg havi so ikki biðið um hetta. Tey mugu halda meg vera blivnan nakað gamlan, sigur Haldgrím Gregersen. Gamli fótbóltsovastin í Gøtu fær nú viðurkenning frá FIFA fyri sítt drúgva arbeiðið fyri føroyskum fótbólti**

HEIÐURSLØN
*Eyðun Klakstein*




*Haldgrím Gregersen myndaði í nógv ár ítróttarlívið í Gøtu, og hann hevur eisini hitt onkrar av stóru fótbóltsbossunum úti í Europa. Her er hann saman við Lennart Johansson, formanni í UEFA*

Er tað nakar persónur, sum fram um aðrar hevur myndað ítróttarlívið í Gøtu, so man tað vera Haldgrím Gregersen, sum í 43 ár sat í nevndini hjá Gøtu Ítróttarfelag. Nógv av árunum var hann formaður í felagnum. Nú hevur altjóða fótbóltssamgongan FIFA gjørt av, at Haldgrím Gregersen skal heiðrast fyri stítt stóra arbeiðið fyri føroyskan fótbólt.

– Eg havi so ikki biðið um hetta. Tey mugu halda meg vera blivnan nakað gamlan, svarar Haldgrím skemtandi, tá ið hann verður spurdur um, hvat hann heldur um heiðurslønina.

– Eg veit ikki, hvat eg skal siga til tað. Eg eri sera stoltur av, at eg fái ein slíka viðurkenning fyri mítt arbeiði, sigur hann.

### Vóru ikki í iva um innstilling

FIFA, sum er samtakið fyri øll fótbóltssambondini kring heimin, hevur gjørt av, at Haldgrím Gregersen skal hava Centennial Order of Merit, sum verður latin í sambandi við, at FIFA verður 100 ár í ár.

Føroyska fótbóltssambandið varð biðið um at innstilla ein persón, sum tað helt hevði uppiborið eina virðisløn fyri sítt arbeiði í føroyskum ítrótti.

– Kravið var ikki, at tað endiliga skuldi verða nakar formaður, men vit vóru als ikki í iva um, hvønn vit skuldu innstilla, sigur Óli Holm, formaður í FSF.

– Haldgrím Gregersen hevur gjørt eitt sera gott arbeiði fyri føroyskan fótbólt í eitt mannaminni, hann er heiðurslimur hjá FSF, og hann hevur avgjørt uppiborið eina slíka viðurkenning, sigur Óli Holm.

FSF gav FIFA sína innstilling, og FIFA gekk henni á møti. Seinni í hesum mánaðinum verður heiðursgávan latin fyrrverandi GÍ-formanninum á eini samkomu í FSF-húsinum í Havn.

### Stór framgongd í fótbóltinum

Tað var í 1956, at Haldgrím Gregersen fyrstu ferð kom í nevndina hjá GÍ. Hann var stutt frammanundan blivin arbeiðsformaður, og so helt hann seg til í lokala ítróttarfelagnum eisini.

– Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri ítrótti. Vit plagdu at rógva kapp ímóti klaksvíkingum, og tað var við til at økja um áhugan, sigur Haldgrím Gregersen. Fótbólturin hevði ikki bestu umstøður, tá ið Haldgrím kom við í nevndini í GÍ, og í hansara tíð er fótbóltsvøllurin og økið rundan um vorðið veruleiki.

– Vit bygdu nýggja fótbóltsvøllin av berari idealismu. Eg haldi ikki, at slík idealisma er til longur. Tað er so nógv broytt hesi árini, heldur Haldgrím.

Fótbóltsspælið í Gøtu var fyri stórari menning tey árini, Haldgrím var í nevndini hjá GÍ. Tá ið hann kom uppí, var gamli fótbóltsvøllurin, sum lá har, ið Harenga nú liggur, mest sum oyðilagdur av brimi, og tá ið Haldgrím gavst, hevði GÍ vunnið seks FM-heitið (tey fýra á rað), fingið nýggjan vøll og spælt altjóða fótbólt fleiri ferðir.

Men GÍ var nógv meira enn bara eitt fótbóltsfelag.

– Vit løgdu alla tíðina dent á, at vit skulu hava sum mest av virksemi, og eitt skifti høvdu vit seks ymiskar ítróttargreinar í GÍ. So væl stendur tað tíverri ikki til longur.

### Valdi at gevast

Haldgrím Gregersen var ein partur av leiðsluni í GÍ heilt fram til 2000, tá ið hann gjørdi av at leggja frá sær sum formaður.

– Eg haldi, at tey vóru blivin eitt sindur troytt av mær tá, sigur Haldgrím um orsøkina, hví hann valdi at steðga.

Men áhugin fyri ítróttinum er ikki minkaður fyri tað, og Haldgrím fylgir væl við í gongdini hjá GÍ, og tað er onkur, sum hevur fylgt við í tí, sum Haldgrím hevur gjørt, tí nú fær hann heiðursløn fyri sítt arbeiði.

– Tað eri eg sera fegin um. At verða virkin í einum ítróttarfelag, kanst tú ikki liva av, tað skal gerast av áhuga. Og tann áhugan hevði eg í nógv ár, men tað hevði ikki latið seg gjørt, um eg ikki fekk so góðan stuðul frá konuni, sigur Haldgrím Gregersen.

27. juni fær hann heiðursgávuna frá FIFA.

# Brattaskor sigldi á land

**Fríggjamorgunin fór glastrevjabáturin Brattaskor av Argjum á land undir Klakkinum. Báturin kláraði sjálvur at Kósabryggjuni**

LANDKENNING

Glastrevjabáturin Brattaskor av Argjum, sum rør út úr Klaksvík, bar við land undir Klakkinum fríggjamorgunin.

Klaksvíkar sløkkilið varð boðsent at koma á Kósabrúnna, haðar báturin sjálvur kláraði at sigla, sigur Kári Kjelnæs, sløkkiliðsleiðari í Klaksvík.

Pumpur vórðu fingnar umborð, og fiskur og útgerð fingin í land, áðrenn báturin var tikin upp á sleipistøð í Klaksvík.

Hol var á skrokkinum framman, sigur Kári Kjelnæs.

**ej**

